HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tvøroyrar Havn

FO-800 TVØROYRI

Tórshavn, hin 14. apríl 2004
Málnr.: 69-200400011-11
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

## Loyvi til aftursøkking

### 1. Loyvi og heimild

Sambært grein 2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, veitir Heilsufrøðiliga starvsstovan við hesum loyvi til at aftursøkkja umleið 6.000 $m^3$ av tilfari, sum ætlanin er at taka upp av botni úr kaihylinum á Tvøroyri.

Aftursøkkingin kann fara fram á streymasjógvi uttan fyri Trongisvágsfjørð á umleið 61° 32' N og 06° 44' V, sum víst á hjálagda korti.

### 2. Umsóknin

Hin 23. december 2003 hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan fingið umsókn frá Tvøroyrar havn um aftursøkking av umleið 6.000 $m^3$ av tilfari, sum ætlanin er at taka up av botni í sambandi við dýping av kaihylinum á Tvøroyri. Í umsóknini verður søkt um loyvi at søkkja tilfarið eystan fyri Tjaldavíkshólm, á umleið 61° 32' N; 6° 45,5' V.

### 3. Ummæli

Sambært grein 5 í áðurnevndu kunngerð um aftursøkking skulu umsóknir sendast til Fiskimálaráðið, Landsverkfrøðingin og avvarðandi kommunu til ummælis.

Hin 8. januar 2004 varð umsóknin send áðurnevndu stovnum til ummælis.

Í skrivi frá Fiskimálaráðnum, dagfest 25. februar 2004, verður sagt, at Skipaeftirlitið og Fiskiveiðueftirlitið ongar viðmerkingar hava til umsóknina.

Í sama skrivi er hjáløgd meting frá Fiskiransóknarstovuni, har mælt verður til at søkkja tilfarið á streymasjógv uttan fyri fjørðin, og um tað ikki ber til, á einum øki millum Tjaldavíkshólm og Flesina.

Í skrivi frá Landsverkfrøðinginum, dagfest 23. mars 2004, verður mælt til, at økið til aftursøkking verður flutt uml. ein fjórðing í ein landsynning, so at aftursøkkingin fer fram á streymasjógvi.

Í skrivi frá Tvøroyrar kommunu, dagfest 7. apríl 2001, verður mælt til at loyva ætlanini hjá Tvøroyrar havn.

### 4. Treytir

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

4.1 Áðrenn farið verður undir arbeiðið, skulu sýni takast av botninum í kaihylinum, har tilfarið, sum skal aftursøkkjast, verður tikið.
Sýnistøku- og kanningarskrá er lýst í fylgiskjali til hetta skriv. Sýnistøka og kanningar skulu gerast av felag, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Frágreiðing um kanningarnar við úrslitum skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.
Allar sýnistøkur og kanningar verða goldnar av Tvøroyrar havn.

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

4.2 Aftursøkkingin skal fara fram á streymasjógvi uttanfyri Trongisvágsfjørð, á umleið 61° 32’ N ; 06° 44’ V (WGS 84), sum víst á hjálagda korti.

4.3 Aftursøkkingin kann ikki fara fram, fyrr enn kærufreistin sambært stk. 5 er úti.

4.4 Boðast skal frá til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, nær arbeiðið byrjar. Eisini skal boðast frá, tá ið arbeiðið er liðugt.

4.5 Loyvið umfatar bara tilfar, sum er tikið upp av botni úr kaihylinum á Tvøroyri.

**5. Eftirlit**

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Tvøroyrar havn skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann útinna eftirlitið.

**6. Gjald**

Tvøroyrar havn skal, sambært kunngerð nr. 31 frá 8. mars 2001 *um gjøld eftir havumhvørvislógini*, rinda fyri ta viðgerð, Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

**7. Kæruvegleiðing**

Hendan avgerð kann, sambært grein 10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Landsverkfrøðingurin, Postrúm 78, FO-110 Tórshavn
Fiskimálaráðið, Postrúm 87, FO-110 Tórshavn
Tvøroyrar kommuna, Postrúm 41, FO-8700 Tvøroyri

**Fylgiskjal**

**Sýnistøku- og kanningarskrá**

Takast skulu sýni á trimum støðum á arbeiðsøkinum. Hvørt sýni skal hava tvey replikat, sum kunnu blandast.

Til sýnistøkuna skal nýtast c*orer / haps*, og skal øll kjarnan nýtast. Ber ikki til at nýta haps, kunnu sýnini takast við grabbi. Upplýsast skal, hvar sýnini eru tikin, teknað inn á kort.

Gerast skal ein lýsing av sýnunum, so sum luktur, útsjónd, litur o.s.fr.

Kemiskar kanningar skulu gerast av sýnunum. Evnini, sum kannast skulu, og detektiónsmarkið fyri einstøku evnini, eru víst í talvuni niðanfyri.

| **Evni** | **Detektiónsmark** |
|---|---|
| *Cd* | *0,5 mg/kg te* |
| *Cu* | *50 mg/kg te* |
| *Hg* | *0,1 mg/kg te* |
| *Pb* | *15 mg/kg te* |
| *Zn* | *50 mg/kg te* |
| *PCB nr. 28, 52, 101, 118, 138, 153 og 180* | *2 µg/kg te fyri einstøku sambondini* |
| *PAH:*<br>*Acenaftene*<br>*Acenaftylene*<br>*Antracen*<br>*Benzo(a)antracen*<br>*Benzo(a)pyren*<br>*Benzo(b)fluoranten*<br>*Benzo(ghi)perylen*<br>*Benzo(k)fluoranten*<br>*Chrysen*<br>*Dinenzo(a,h)antracen*<br>*Fluoranthen*<br>*Fluorene*<br>*Indeno(1,2,3-cd)pyrene*<br>*Naftalen*<br>*Phenanthren*<br>*Pyrene* | *0,2 mg/kg te fyri einstøku evnini* |